# Rækjuflotin tódnar burtur í einki

**Um dagarnar frættist, at rækjutrolarin, Hvilvtenni, er seldur til Íslands, men reiðarin vil hvørki vátta ella avsanna tíðindini. – Eg trúgvi, at tað er ein spurningur um tíð, nær føroyska rækjuvinnan steðgar upp, sigur Kjartan Joensen**

RÆKJUVINNAN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Hvilvtenni telist millum føroysku rækjuskipini, sum skapa samfelagnum eitt fyrstahondsvirði uppá eina fjórðingsmiljard um árið. Sum skilst, er lagnan hjá skipinum óviss*

Á vári ár 2000 vóru 12 rækjuskip í føroyska rækjuskipaflotanum. Í teirri bestu tíðini, vóru skipini uppaftur fleiri. Í løtuni eru 8 skip eftir við Arctic Viking og South Island, sum leirvíkingar nýliga hava keypt. Tá ið Arctic Viking er flaggaður út, verður talið 7.

Spurningurin er so, hvussu útlitini eru hjá teimum 7 skipunum, sum tá eru eftir.

Ein annar spurningur, sum eisini tekur seg upp, er, hvussu vit skulu megna at varðveita okkara søguligu veiðirættindi, tá ið lítil og eingin rækjufloti er eftir.

### Hvilvtenni

Í vikuni frættist, at Hvilvtenni er seldur til Íslands, men reiðarin, Kjartan Joensen, sigur seg onga viðmerking hava til tíðindini.

– Eg trúgvi, at tað er ein spurningur um tíð, nær vinnan steðgar upp. Hóast rækjuflotin ikki fiskar av umbýtiskvotu, og fyrstahondsvirðið hjá flotanum er ein fjórðingsmiljard, so er kortini ikki líkt til, at nakar politiskur áhugi er at gera tað møguligt hjá hesum skipum at vera verandi í flotanum.

Kjartan sigur, at rækjumenn í hálvt triðja ár hava tosað við løgmann, landsstýrismannin í fiskivinnumálum og fíggjarmálaráðharran.

– Einki er komið burtur úr, og nú haldi eg, at nóg mikið er tosað, leggur hann aftrat.

### Sterkir herðar

Tað seinasta undir himmalinum, sigur Kjartan Joensen, er, at nakrir rækjumenn í Kollafirði eru vorðnir hunddálkaðir.

– Tað skulu sterkir herðar til at vinna ígjøgnum slíkan ágang, sum her hevur verið talan um, sigur reiðarin í Leirvík at enda.

Hvilvtenni er í løtuni undir Eysturgrønlandi á rækjuveiði.

Sosialurin royndi í gjár at fáa fatur á Jacobi Vestergaard, landsstýrismanni í fiskivinnumálum, men hann var ikki at hitta.

Vit hava skilt, at Fólkaflokkurin eftirhondini er at tosa við um bjarging av rækjuflotanum, meðan Tjóðveldisflokkurin framvegis er ímóti.

Livst, so spyrst.

### Ábyrgdarleyst

Ein vinnulívsmaður, sum Sosialurin hevur tosað við, sigur, at hann altíð hevur verið ímóti studningi, men málið við rækjuflotanum er ekstremt, sum hann tekur til.

– Tí haldi eg tað vera ábyrgdarleyst av myndugleikunum ikki at taka hond um flotan, soleiðis at føroyingar eisini í framtíðini kunnu hava ein rækjuflota.

Hann heldur, at tað kann vera skaðiligt í einum samfelag sum okkara, tá ið myndugleikarnir vísa seg als ikki at hava skil fyri vinnulívi, sum málið um rækjuflotan er eitt prógv um.

– Vit hava skjótt 400 miljónir ES-borgarar á hinari síðuni, sum fáa stuðul til alt millum himmar og jørð, samstundis sum okkara politikarar seta seg afturá, meðan rækjuflotin bløðir út, sigur hann.

# Rækjuvirkið á Oyri merkir minkingina

**Sofus Poulsen, stjóri á Rækjuvirkinum á Oyri, sigur, at tey merkja týðiliga, at rækjuflotin er minkaður. – Føroysku skipini eru grundarlagið undir virkseminum á Oyri, og henda ongar broytingar í tollviðurskiftunum við ES, er ikki ilt at ímynda sær, at uppaftur minni verður at gera, um rækjuflotin minkar uppaftur meira, sigur hann**

RÆKJUVINNAN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

*Føroysku rækjurnar eru grundarlagið undir virkinum á Oyri. Minkar rækjuflotin uppaftur meira, og tollviðurskiftini ikki broytast, eru framtíðarútlitini hareftir*



Á rækjuvirkinum á Oyri, sigur stjórin, Sofus Poulsen, at tey merkja týðiliga, at færri skip eru í føroyska rækjuskipaflotanum.

– Vit plaga at arbeiða rækjur alt árið, undantikið tá ið fólkið hevur frí. Men í fjør lá virksemið stilt í fýra mánaðir tilsamans, tí virkið hevði ov fáar rækjur.

Hann sigur, at føroyski rækjuskipaflotin, sum er nógv minkaður seinastu árini, framvegis er grundarlagið undir virkinum á Oyri.

– Skulu vit keypa rækjur úr øðrum londum, noyðast vit at rinda 20% í tolli, og tá hongur virksemið ikki saman.

Sofus vísir á, at henda ongar broytingar í tollviðurskiftunum við ES, er ikki ilt at ímynda sær, at uppaftur minni verður at gera á virkinum, um rækjuflotin minkar uppaftur meira.

### Tollsamráðingar

– Leingi hevur verið arbeitt við at fáa í lag eina betri handilsavtalu við ES, soleiðis at rækjur og onnur fiskasløg sleppa undan tollinum. Sum eg havi skilt, er málið nú komið har til, at okkurt hendir í næstum, tá ið samráðingar verða við ES um hesi viðurskifti.

Sofus Poulsen sigur, at tað hevði verið ein stórur fyrimunur fyri virkið á Oyri, um tey kundu keypt eitt nú norskar og íslendskar rækjur og selt tær av aftur landinum undir somu treytum sum føroyskar.

– Men so leingi, sum føroyski rækjuskipaflotin framhaldandi minkar, og vit ikki kunnu keypa útlendskar rækjur, eru framtíðarútlitini hareftir, sigur hann.



# Italsk matstova letur upp

**Matstovan, Toscana, letur upp hósdagin. Matstovan fer at selja italskan mat burturav. Eigarin, Mohsem Darvishi, ber ikki ótta fyri, at hann ikki fer at klára seg í hørðu kappingini um kundarnar. Hann heldur tað verða gott, at fólk hava nógvar matstovur at velja ímillum**

NÝGGJ MATSTOVA
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Toscana er nýggjasta matstovan í Havn. Matstovan liggur aftanfyri Havnar klubba, og hon fer at selja italskan mat burturav. Hon letur upp hósdagin*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Hósdagin letur enn ein matstova upp í høvuðstaðnum. Tað er Mohsem Darvishi, sum letur upp matstovuna, Toscana, aftanfyri Havnar klubba.

Toscana fer at selja italskan mat burturav. Møguleiki verður at fáa matin gjørdan til, júst sum italiumenn vildu gjørt hann.

– Eg kann beinanvegin siga, at eg fari ikki at selja pitsa. Gestirnir kunnu millum annað fáa italskar suppur, skaldýr, oksakjøt, rækjurætt, dessertir, sigur eigarin av Toscana

Matstovan, Toscana fer at hava opið allar vikudagar fram til jóla. Eftir jól er ætlanin, at matstovan letur aftur ein dag um vikuna.

Nýggja matstovan hevur eisini fingið skeinkiloyvi, og tað fegnast Mohsem um. Hann leggur afturat, at vín hóskar ómetaliga væl til italskan mat, og hann hevur tí fingið fatur á serligum víni til gestirnar hjá sær.

### Nógvir møguleikar

Eigarin av matstovuni, Toscana, ber ongan ótta fyri, at hann ikki fer at standa seg í hørðu kappingini um kundarnar í Havn. Tað er einki dulsmál, at fleiri og fleiri matstøð lata upp, og tí er spurningurin, um øll matstøðini fara at megna at hóra undan í hørðu kappingini.

– Eg haldi bara tað er positivt, at fólk fáa nógvar matstovur at velja ímillum. Gevur tú kundunum hjá tær eina góða tænastu, so koma tey aftur. Eg haldi, at eg havi nakað serligt, tí eingin matstova hevur italskan mat burturav, og við at veita eina góða tænastu, vóni og vænti eg, at eg fari at klára meg, sigur Mohsem Darvishi, eigari av Toscana.





# Dollarin og yvirgangur í andgletti

MARKNAÐARRÁK

Fyri viku síðani væntaði Marknaðarrák, at rákið við hækkandi rentum fór at seta dám á farnu viku, men at hetta rák fór at verða tengt at gjaldoyragongdin. Gjaldoyragongdin fekk annan av høvuðsleiklutunum, tí ein av stóru hendinginunum í farnu viku varð ógvusliga fallið í dollaranum. Orsøkirnar til dollarafallið eru millum annað, at ein uppgerð fyri septembur vísur, at peningarenslið inn í USA er fallið munandi. Samstundis hevur tosið um toll av kinverskum vørum, ið verða innfluttar í USA, viðført eitt trýst á dollaran.

Yvirgansatsøknin í Istanbul fekk eisini ávirkan á virðisbrøvini. Bumbuspreingingirnar mintu marknaðarluttakarar aftur á 11. septembur 2001, og førdi við sær, at yvirgangur aftur kom á dagsskránna. Syrgiliga hendingin fekk marknaðarluttakarar at selja partabrøv og keypa lánsbrøv í staðin. Hetta fekk partabrøv og lánsbrævarentur sum heild at fella.

Roknskapirnir frá farnu viku gjørdust misjavnir. Meðan HomeDepot og Hewlett-Packard kunngjørdu hægri inntøkur enn væntað, gjørdust roknskapirnir hjá Jyske Bank og Coloplast áleið sum væntað. Roknskapurin hjá ISS var vánaligur. Hesa vikuna kunngerða virkini Group 4 Falck og Topdanmark. Samstundis fer Vestas Wind Systems at kunna um gondina og marknaðarstøðuna hjá teimum. Kunningin frá Vestas verður áhugaverd, orsakað av sera vánaligu tíðindunum frá kappingarneytanum NEG Micon herfyri.

Ógjørligt er at siga nakað um, hvørja ávirkan yvirgangur fer at hava á virðisbrævamarknaðirnar restina av árinum. Um lærast skal av farnum døgum, vil marknaðurin sum frálíður gloyma slíkar hendingar, og savna seg um grundleggjandi búskaparligu gongdina aftur.

Hóast prísvakstrartøl úr USA, frá farnu viku, kundu verið betri, gjørdust framatlítanti álitistølini úr USA aftur góð, samstundis sum bjarta gongdin á arbeiðsmarknaðinum, har yviri, heldur áfram. Tískil er grundaður møguleiki fyri, at marknaðirnir aftur fara at ávirkast av positivu búskaparligu gongdini. Serliga týsdagin og mikudagin vera áhugaverdar búskaparuppgerðir kunngjørdar og hesar fara sannlíkt at vera positivar og kunnu fáa partabrøv og rentur at hækka. Yvirgangsatsóknin í Istanbul og bangilsi fyri, at fleiri slíkar vera at síggja í næstum, kunnu tó gera, at markanaðirnir vera óstøðugir í hesa vikuna.

Rentur

| | Renta | +/- %-stig |
|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% |
| 2 ára lánsbræv | 2,92% | 0,05% |
| 5 ára lánsbræv | 3,74% | 0,05% |
| 10 ára lánsbræv | 4,55% | 0,04% |

Partabrævavísitøl

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| KFX, Danmark | 246,8 | -0,8% |
| OMX, Svøríki | 608,7 | -1,4% |
| DJ Stoxx 50, Evropa | 2.551,4 | 0,4% |
| S&P 500, USA | 1.035,3 | -1,4% |

Íløgufeløg

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 106,87 | 0,3% |
| Evru Lánsbrøv | 163,77 | 0,1% |
| Norrøn Partabrøv | 71,16 | -3,6% |
| Altjóða Partabrøv | 71,22 | -2,8% |

Gjaldoyru

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 626,77 | -1,0% |
| EUR | 743,67 | 0,0% |
| GBP | 1.066,47 | -0,4% |
| NOK | 91,12 | 0,6% |

*Renta og kursir kl 10 í gjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*